# Sett á eitt síðuspor

**Formaðurin í Inuit Ataqatigiit heldur, at føroyingar og grønlendingar kunnu vera fyrimynd fyri onnur fólkasløg**

FLOKSTING
*Heri á Rógvi*

Ein av gestanum á Flokstingi Tjóðveldisfloksins, sum er aðalfundurin hjá flokkinum, var Josef Motzfeldt.

Hann er formaður fyri Inuit Ataqatigiit, sum er at rokna sum grønlendski loysingarflokkurin.

Inuit Ataqatigiit samstarvar við Tjóðveldisflokkin í Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi.

Í sínari røðu nevndi Josef Motzfeldt, at Føroyar og Grønland vóru sett út á eitt síðuspor av dønum.

Hann greiddi frá, at tey í Inuit Ataqatigiit saman við øðrum kreftum í Grønlandi arbeiða hart fyri at gera Grønland minni bundið av dønum – bæði fíggjarliga og tjóðskaparliga. Arbeitt verður í løtuni við einari tvey ára ætlan, eftir at ein serlig sjálvstýrisnevnd hevur gjørt eitt fyrireikandi arbeiði.

– Vit hava altíð hildið upp á, at grønlendingar eru ein serstøk tjóð, sigur Josef Motzfeldt.

Josef Motzfeldt sær nógv eins viðurskifti gera seg galdandi fyri Grønland og Føroyar.

– Hetta, okkara felags mál, kann vera íblástur hjá øðrum um ikki at geva upp, sigur Josef Motzfeldt.

Eisini eitt umboð fyri íslendska bróðurflokkinum hjá Tjóðveldisflokkinum luttók á Flokstinginum. Talan er um Vinstra Grænna flokkin, sum vann nógvar atkvøður við seinasta Altingsval í Íslandi. Formaðurin Steingrímur Sigfússon kundi ikki koma, men eitt umboð fyri ungmannafelagið hjá flokkinum luttók á Flokstinginum

Ìslendska umboðið tosaði á Flokstinginum á íslendskum, og hann segði seg fegnast stórliga um støðutakanirnar hjá Tjóðveldisflokkinum og teirra arbeiði fyri einum fult sjálvstøðum Føroyum.



Umboðið fyri Vinstri Grænna og Josef Motzfeldt.

*Mynd: Heri á Rógvi*

# Byggja upp innanífrá




*Tjóðveldisflokkurin helt Floksting í Hósvík um vikuskiftið.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

**Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum vísti, at tjóðveldisfólk eru troytt av nógva klandrinum og rokinum í fjølmiðlunum. Men semja er um at byggja upp innanífrá, og samgonguna tosar eingin um at slíta**

FLOKSTING/FRÁGREIÐNG
*Heri á Rógvi*

Tú&e.

Soleiðis ljóðar slagorðið í einari nýggjari herferð hjá Tjóðveldisflokkinum. Ætlanin varð løgd fram í Flokstinginum, ið varð hildið í Hósvík um vikuskiftið.

Laufey Blaasvær legði vegna ein fyrireikingarbólk fram Tú&e ætlanina. Bólkurin hevur til endamáls at marknaðarføra flokkin og politikkin hjá flokkinum, har Tjóðveldisflokkurin sjálvur vil sleppa at seta dagsskránna.

Hóast herferðin er fyrireikað áðrenn fundin, sigur hon nógv um, hvat varð tosað um, tá Sosialurin vitjaði Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum leygardagin. Fólk vilja hava politikkin á dagsskránna og klandrið burtur.

– Vit skulu standa saman, segði Atli Eriksen, og hetta var eisini stóri boðskapurin hjá formanninum, Høgni Hoydal, í formansrøðuni.

Tað ljóðar kanska banalt og lítið spennandi at siga, at fólk vilja hava politikkin fram og klandri burtur, men hetta hevur kanska í hesum førinum eitt sindur meira innihald enn í vanligari talu.

Og ferð eftir ferð varð tosað um tað sama – at byggja upp innanífrá. Fundurin boðaði ikki frá so øgiliga nógvum ítøkiligum politiskum ætlanum hjá flokkinum, men mest eitt ynski um at fáa arbeiðsfrið.

Hetta sást eisini ógvuliga týðuliga aftur í teimum innkomnum uppskotunum. Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag legði fram uppskot til samtyktar um, at tingmenn og landsstýrismenn hjá flokkinum skuldu halda ósemjur við hvønn annan sínamillum og innanflokka. Eitt uppskot, sum kanska burdi verið óneyðugt, men tjóðveldisfólk eru troytt av klandri.

Men eingin er kortini vorðin so troytt ella troyttur, at tosað verður um at slíta samgongusamstarvið. Hetta varð so at siga ikki tikið upp á tungu allan leygardagin.

Jógvan Jacobsen frá Unga Tjóðveldinum tosaði um at fáa flokkin at leggja misálit á Anfinn Kallsberg, tí hesin skikkaði sær so illa mótvegis Tjóðveldisflokkinum. Tað var kanska eisini Unga Tjóðveldið, sum stóð fyri tí nógva av tí mest atfinningarsama.

Millum annað hevði felagið eitt uppskot um at skipa soleiðis fyri, at tingmenn, t.e. fólkatingsmenn ella løgtingsmenn, bert kunnu vera í einum av hesum starvi og fulla tíð.

Kjakið gjørdist rættiliga heitt við hesum, og løgtingsmenn – kanska serliga Heini O. Heinesen – dámdu einki uppskotið. Kjakið var næstan ovurupphitað, tá Høgni Hoydal við stórum myndugleika fekk dempað kjakið niður. Myndugleikin hjá floksformanninum er stórur á Flokstingi, og hann vísti stundum evnir sum fáur at tosa við fjøldina.

Uppskotið vann ikki frama.

Og tað vóru eisini onnur, sum høvdu heldur neilig ting at siga um løgmann, men tað varð so at siga ikki tosað hart um at slíta samgongusamstarv, og fólk vóru sostatt eisini samd, at tað var rætt at halda fram í samgonguni.

Hóast Flokstinginum virkaði solidariskt púra samt, so vóru tað meira enn so atfinningar. Fólkavaldu umboðini hjá flokkinum fingu sum sagt serliga ábreiðslurnar fyri klandrið sína millum, og tey vóru fleiri, sum hildu, at politikkurin var vorðin ov lítið merktur av fullveldinum.

## Fjølmiðlarnir

Eitt annað, sum gekk aftur oftani á Flokstinginum, vóru viðmerkingar til fjølmiðlarnar. Føroysku fjølmiðlarnir fáa ikki nøkur lovprísandi orð frá tjóðveldisfólki.

Fólk flest kendu tað soleiðis, at flokkurin var ógvuliga illa viðfarin í fjølmiðlunum.

Fjølmiðlarnir gera alt ov nógv uim skandalur og persónssøgur og lítið um politikkin. At broyta hetta verður eitt av málunum hjá flokkinum í næstum.

Ein av teimum, sum hevur verið mest frammi í fjølmiðlunum, Páll á Reynatúgvu, greiddi frá sínari støðu í sambandi við ósemju millum seg og SvF. Hann helt seg einki skeivt hava gjørt – bert hildið seg til avtalur, gjørdar við SvF. Hann skeyt upp eina hólmgongu fyri opnum skíggja um málið.

## Halda á

Sum heild vísti Flokstingið ein flokk, sum ikki koyrir við fullari ferð í løtuni. Fólk eru troytt at klandri, og torført er at halda mótinum uppi, men semja er um betringar. Uppmøtingin var eisini eini hundrað fólk, tá tað var mest, og hetta sigur ikki so lítið um áhugan fyri flokkinum.



# Vert at halda fram

**Í sínari formansfrágreiðing eggjaði Høgni Hoydal sínum floksfeløgum til at halda áfram hóast mótburð. Formaðurin trýr enn upp á samgonguna, hóast hann ásannar, at tað er trupult**

FLOKSTING
*Heri á Rógvi*

– Tað er í mótburðinum, vit skulu vinna styrkina. Og tað finst eingin løtt leið at klintra, segði Høgni Hoydal í sínari formansfrágreiðing á Flokstingi Tjóðveldisfloksins.

Formaðurin nýtti fagur myndamál um at finna blómurnar á bjargaleiðum. Ein av boðskapunum var, at tjóðveldisfólk mugu ganga nýggjar leiðir fyri at fremja endamálið hjá flokkinum um eina sjálvstøðugar Føroyar.

Og henda leiðin hevur kanska ongantíð verið brattari við mótganginum seinastu tíðina, men neyðugt er at halda fram, ljóðaði tað frá Høgna Hoydal.

Tann ellivu síður langa formansgreiðingin er stundum ásannandi um tungan burð, men hóast mótgang, metir formaðurin, at haldast kann fram, og flokkurin hevur góð kort á hondini. Hann nýtti flest allar møguleikar at vísa á, at tjóðveldishugsanin bert kann virka í felagsskapi við øllum tjóðveldisfólkum – og ikki bert teimum fólkavaldu.

Stevnan skal vera, at politikkurin skal snúgva seg um "Tú&e", helt Høgni Hoydal.

– Eg nokti fyri, at vit, tá mótburðurin og óløgini eru størst, skulu gevast at rógva. Eg nokti fyri, at vit skulu velja tann pínslaváttarleiklutin, sum tykist vera dyrkaður og hevjaður í føroyska almenninginum, sigur Høgni Hoydal.

## Trupult

Hóast formansgreiðingin er full av ljósi og tosaði um betri dagar fyr framman í felagsskapi, verða fleiri síður nýttur til at siga frá um, hvussu trupult flokkurin hevur havt tað í samgongusamstarvi og at føra sín politikk.

Høgni Hoydal segði, at hesi tvey seinastu árini havi verið í afturvendandi politiskum kreppum. Alt ov nógv persónsstríð hevur merkt partapolitiska pallin. Knútapunktið í truplu politisku støðuni er avlýsta fólkaatkvøðan. Tað vóru eisini aðrir luttakarar á Flokstinginum, sum nevndu avlýstu fólkaatkvøðuna, og tað er týðuligt, at hon vekir í minninum.

– Tað eru avleiðingarnar av hesum,sum vit standa við sum ovurstórur trupulleiki í dag, sigur Høgni Hoydal.

Men fyri at halda fast í søguliga møguleikanum varð hildið fram við samgonguni við einari neyðsemju.

– Men eg skal erliga viðganga, at eg framvegis vakni um næturnar og ivist í, um vit ikki skuldu havt slitið samgonguna, tá hinir samgonguflokkarnir lupu frá upprunaliga fullveldisætlanini, sigur Høgni Hoydal.

## Gott val

Høgni Hoydal fegnaðist um valúrslitið hjá flokkinum. Hann heldur valið var ein sigur fyri fullveldishugsjónina.

Men eftir valið vóru aftur nýggir trupulleikar at hóma.

Hesa ferð vóru tað samráðingar á Gamla Apoteki og serliga Fólkaflokkurin. Tað skapti misálit, tá Fólkaflokkurin fór at samráðast við aðrar flokkar, eftir at samráðingarnar við Javnaðarflokkin vóru slitnaðar, og aftur tá Hergeir Nielsen ikki fekk stuðul at gerast tingformaður.

At enda varð ein samgonga fingin í lag við Miðflokkinum, men Tjóðveldisflokkurin visti, at samgongan fór at vera skinklut, tá flokkarnir eru so ymiskir.

Og gongdin higartil hevur ikki verið góð, hóast Tjóðveldisflokkurin er sinnaður at halda fram. Persónsstríð eftir persónsstríð, sum formaðurin illa kann finna orð fyri.

Men trupulleikarnir við fjølmiðlunum verða ikki gloymdir í formansfrágreiðingini heldur.

Hvørt málið sær fekk eina viðmerking frá Høgna Hoydal.

Niðurstøðan var, at fjølmiðlarnir – hóast góðar sømdir frá flokkinum – framdi stundum hysteriska viðgerðir av málum, har tjóðveldisfólk ikki sluppu at verja seg.

Men hóast alt rok og klandur, vil flokkurin framvegis royna óroyndar leiðir. Hetta verður við fullveldishugsjóni fyrst og fremst. Millum annað við at minka blokkstuðulin, loysa kommunurnar frá landskassanum og lata tær taka ábyrgd og vinnan skal gerast meira sjálvstøðugt og studningsfrí.




*– Eg nokti fyri, at vit, tá mótburðurin og óløgini eru størst, skulu gevast at rógva. Eg nokti fyri, at vit skulu velja tann pínslaváttarleiklutin, sum tykist vera dyrkaður og hevjaður í føroyska almenninginum, sigur Høgni Hoydal*

*Mynd: Heri á Rógvi*